LØGTINGIÐ

Til allar tingmenn

Løgtingsformaðurin

**3. apríl 2020**
**j. nr.**
(at tilskila í svari)

**Viðvíkjandi tingfundum og nevndarfundum undir Corona-farsóttini**

Formansskapurin í Løgtinginum hevur umrøtt, hvussu Løgtingið best skipar sítt virksemið, nú meðan Corona-farsóttin avmarkar virksemið í tinginum.

Í sambandi við komandi tingfundir hevur Formansskapurin gjørt av at halda fast um áður givin boð í skrivum til tingmenn, dagfest ávikavist 12. og 17. mars 2020.

Harumframt hevur Formansskapurin fyribils tikið avgerð um:

- At bert framsøgumenn fyri flokkin fáa orðið til 1. viðgerð. Tíðin verður ásett í mun til, hvussu nógv mál verða viðgjørd undir einum, og møguleiki verður at gera viðmerkingar til framsøgumenninar.
- At nevndarfundir verða avmarkaðir í mest møguligan mun, og at møguligar innkallingar verða gjørdar umvegis netið í tann mun, at hetta letur seg gera.
- At eitt umboð fyri hvønn flokk kann fáa orðið til 2. viðgerð. Tíðin verður ásett í mun til, hvussu nógv mál verða viðgjørd undir einum.
- At tað framhaldandi bert verða 20 tingmenn til staðar, og at tað sum meginregla í mesta lagi eru 10 fólk í tingsalinum í senn.
- At atkvøðugreiðslur verða skipaðar á sama hátt sum seinast, tvs. at tá tey fyrstu hava atkvøtt, fara tey út, meðan onnur koma inn í salin at atkvøða o.s.fr.

Heitt verður á tingmenn um at virða ávaringarskeltini í bygninginum, halda neyðuga frástøðu, minnast til handreinføri og at njósa/hosta í ermuna.

Vinarliga

Jógvan á Lakjuni
løgtingsformaður

TINGHÚSVEGUR 1-3
POSTBOKS 208
100 TÓRSHAVN
TLF. 363900
FAX. 363901